# Ritan hon er góð, men ...

**- Ritan hon er sera álítandi, men vit ynskja okkum kortini eina aðra og varandi loysn, slær nólsoyarkvinnan Vígdis Bjarnadóttir fast. Í morgun fór hon enn einaferð umborð á Rituna áveg til arbeiðspláss sítt í Havn**



SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Nólsoy:** Var tað ikki fyri umboðini hjá tíðindatænastuni, so var einki ferðafólk við Rituni til Nólsoyar kl. 7:55 í morgun.

Hetta man kortini hoyra til undantakið, tí túrin frammanundan vóru eini 40 nólsoyingar ávegis til Havnar. Og tá Ritan legði frá landi í Nólsoy kl. 8:23 vóru 20 ferðandi við.

Eitt av hesum ferðafólkum var tann 38 ára gamla Vígdis Bjarnadóttir, ið starvast sum bókavørður á Landsbókasavninum í Havn.

Hesin stutti túrurin um Nólsoyarfjørð er gerandiskostur fyri hana, og er tí ikki nakað hon soleiðis gongur og hugsar um gjøgnum dagin.

Fyri hana og øll hini 19 ferðafólkini er tað av størsta týdningi, at tey kunnu sleppa til Havnar, tá rutan er. Og tað eru tey so sanniliga sloppin gjøgnum árini: Kann nakað sigast um Rituna so er tað, at hon hevur verið álitið sjálvt hjá teimum 260 íbúgvunum í Nólsoy.

Fyri Vígdis hevur tað ikki so øgiliga stóran týdning, at tað er vorðið 5 krónur dýrari at ferðast fram og aftur við gildi frá nýggjárinum.

Hon vil fegin gjalda henda kostnaðin sum er. Men hon slær samstundis fast, at gleðin hevði verið uppaftur størri at goldið fyri ferðslan, um ein endalig loysn var funnin á farleiðini um Nólsoyarfjørð.

- Hetta er eitt mál sum vit arbeiða við, sigur Vígdis Bjarnadóttir, sum er partur av einum arbeiðsfólki, hvørs endamál er at tryggja nólsoyingum eitt betri skip til farleiðina.

### 12 ella 25%

Tað loypti helst hvøkk á mong ferðafólk, tá tað herfyri fræddist um tvær álvarsamar ætlanir hjá Strandferðsluni: Bæði at hækka prísin á ferðaseðlum, samstundis sum ein minkaði um túratalið á rutunum kring landið.

Eitt var sjálvandi at hækka prísin á ferðaseðlunum. Eitt annað var at hækka prísirnar so mikið sum ætlanin upprunaliga var: Heili 25%.

Undir endaligu viðgerðini av figgjarlógini undan jólum í fjør varð avgerð kortini tikin um, at prísirnir bert skuldu hækka 12%.

Fyri Vígdis Bjarnadóttir og aðrar nólsoyingar merkir hetta, at teir nú skulu gjalda 45 krónur fyri ferðina um Nólsoyarfjørð.

Áður kostaði ferðaseðilin 40 kr, men varð endaliga uppskotið samtykt hevði ferðaseðilin ístaðin kostað 50 kr.

### Rópa fyri at hoyrast

Við heimstaði í Nólsoy og arbeiðsstaði sínum í høvuðsstaðnum, veit Vígdis alt um, hvussu tað er at hava Rituna sum álit á samferðsluøkinum.

Hóast mangir nólsoyingar hava sagt og framvegis siga, at "Ritan er gauv", so er hon kortini ikki betri enn so, enn at tey ynskja sær eitt annað og meiri tíðarhóskandi skip til farleiðina.

Eitt tað fyrsta, sum hon nevnir sum verandi ótíðarhóskandi og beinleiðis óhøgligt umborð, er tann nógvi larmurin niðri í salongini.

- Her er so nógvur larmur, at ein má næstan rópa til tann sum tú tosar við. Annars hoyrir ein einki, slær hon fast.

Eitt annað sum ørkymlar tey ferðandi á Nólsoyarleiðini er ringa luftin í salongini. Ein kundi annars væntað, at tey fingu fríska luft undir ferðini.

Sannleikin er í roynd og veru hann, at henda "fríska" luftin kemur úr maskinrúminum!

### Hætta sær ikki avstað

Eitt annað barometur fyri komfortinum á eini farleið er, hvussu tað er hjá teimum ferðandi at koma umborð



*- Ritan er góð, men okkara hægsta ynski er at fáa eina varandi og meiri høgliga loysn, sigur Vígdis Bjarnadóttir sum ferðast hvønn gerandisdag millum Nólsoy og Havnina*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

> *Her er so nógvur larmur, at ein má næstan rópa til tann sum tú tosar við. Annars hoyrir ein einki*

## Avlýsir ongantíð

**Nólsoy:** Hóast mangir nólsoyingar – og onnur ferðandi við – helst høvdu ynskt sær eitt annað skip, duga tey illa at ímynda sær eitt lív uttan gott ferðasamband um Nólsoyarfjørð.

- Jú, sjálvandi eru vit væl nøgd við siglingina. Ritan er sera álítandi og avlýsir ongan túr orsakað av veðri, slær Vígdis Bjarnadóttir fast.

Hetta er eisini orsøkin til, at fólk í Nólsoy altíð hava verið so fegin um Rituna, sum eisini hevur rókt farleiðina til Nólsoyar síðani hon kom til landið.

Túratalið hava fólk eisini verið fegin um, og tað er neyvan nakar nólsoyingur sum ynskir sær færri túrar enn í dag. Ein slíkan dag sum í dag, mikudagin, siglur hon sjey ferðir millum Havnina og Nólsoy.

Onkran dag verður Ritan nýtt sum farmaskip hjá skúvoyingum, og hesar